## Tjaldur fær nýggjan málverja

Besta kvinnuliðið hjá Tjaldri fekk mikudagin fyrstu stigini á árinum, og hetta er sjálvandi hugaligt í sjálvum sær.

Hondbóltslagið í Runavík man tó ikki gerast verri av, at felagið nú eisini fær tilgongd av einum rumenskum málverja.

Eftir ætlan skuldi málverjin koma við hósdagsflogfarinum, og verður hon sostatt við, tá Tjaldur næstu ferð skal á vøllin, tó at hetta ikki verður fyrr enn 13. november, tá Neistin kemur á vitjan.

Málverjin, sum talan er um, eitur Maria, og hevur hon undan hesum roynt seg í sponskum kvinnuhondbólti eina tíð, so væntandi er talan um munandi styrk, sum felagið nú fær.

**- jm**

Kyndil-Tjaldur 38-25 (18-10):

# Ongantíð nakar ivi

**Kyndilsmenninir snøgt sagt vundu burtur úr Tjaldri, tá liðini hittust mikukvøldið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kanska høvdu menninir hjá Kyndli lært nakað av kvinnudystinum beint áðrenn, tá Tjaldur vann ein sera óvæntaðan sigur á Kyndli.

Í øllum førum var tað soleiðis, at tað var eitt ógvuliga væl tendrað grønt lið, sum fór á vøllin móti teimum gulu, tá menninir hjá báðum feløgunum dystaðust.

### Munur á øllum økjum

Frá fyrsta bríksli var Kyndil nevnliga omanfyri, og teir helmaðu mest sum ikki í fyrr enn seinastu tíggju minuttirnar, tá trivaligi sigurin langt síðani var tryggjaður.

Fremsta orsøkin til sigurin var sjálvsagt, at Kyndil á mest sum øllum plássum hevur eitt sera sterkt lið, og hetta vístu teir veruliga í verki mikukvøldið. Jakob Jónsson, Høgni Klein og Finnur Hansson teljast millum sterkastu bakspælararnir í landinum, og við spælarum sum Hans Áka Dal-Christiansen, Janus Einar Sørensen, Johan Danielsen og øðrum at manna hini plássini er einki at siga til, at Kyndil í ár ætlar sær ein leiklut í oddinum.

Tjaldur tykist hinvegn at vera illa spert í løtuni. Ikki minst kemur tað illa við, at Mortan Hansen er úti við skaða, tí hetta førir við sær, at Dragisa Stojovic er mest sum einasta veruliga hóttanin á liðnum, og tá gerst ov lætt at verja fyri. Gaman í skeyt Dragisa sjey mál hesaferð, men skotroyndirnar mundu fara at nærkast teimum hálvt-hundrað, og tá er lítið vunnið hjá liðnum sum heild.

Tí gjørdist talan ongan tíð um nakran spennandi dyst, og einasta staðfestingin í so máta mundi vera, at meðan Kyndil tykist vera ávegis at nærkast oddinum á stigatalvuni, er Tjaldur framvegis niðasta liðið í deildini.



*Janus Einar Sørensen og liðfelagarnir úr Kyndli høvdu eina lætta uppgávu, tá Tjaldur vitjaði mikukvøldið*

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Tjaldur 38-25 (18-10)**

Málskjúttar:

Kyndil: Høgni Klein 10, Jakob Jónsson 7, Janus Einar Sørensen 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5(1), Finnur Hansson 5(1), Heini Bendtsen 4, Ken Zachariasen 1, Josef Abrahamsen 1

Tjaldur: Dragisa Stojovic 7, Zoran Sarcevic 6, Jens Martin Knudsen 5(2), Ragnar Olsen 2(1), Arnfinn Langgaard 2(1), Dejan Lacok 1, Addi Arngrímsson 1, Uni Højgaard 1

Brotskøst: Kyndil 3, Tjaldur 6

Útvísingar: Kyndil 4, Tjaldur 2

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen og Sámal Hansen. Høvdu eina sera lætta uppgávu, har fremsta uppgávan mundi verat at avgreiða dystin sum skjótast.

## Kyndil skrivar søgu

Tað er ikki fyrr enn um hálvt fjórða ár, at rundi dagurin verður, men longu nú eru tey í Kyndli so smátt farin undir fyrireikingarnar til 50 ára dagin hjá felagnum, sum verður 10 mars í 2006.

Eitt av tiltøkunum í hesum sambandi skal eftir vera ein bókaútgáva, har søgan hjá felagnum gjøgnum hesi 50 verður lýst. Felagið hevur longu verið í sambandi við persónar, sum hava átikið sær uppgávuna at skriva bókina, og nú verður so farið undir at savna saman tilfar til hetta. Sagt verður, at felagið sjálvt hevur eitt rúgvusmikið savn við bæði myndum og tilfari, men at hetta tó langt ífrá er fullfíggjað, og tí verður í løtuni roynt at koma í samband við fólk, sum onkursvegna hava okkurt tilfar liggjandi.

**- jm**

# Jákup skal royna seg í Onglandi

**Komandi vikuna verður landsliðsleikarin í Crewe, har hann skal sannføra leiðsluna um, at hann eigur at teljast millum leikararnar í felagnum**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit áður hava nevnt, so hava føroysku avrikini á fótbóltslandsliðnum av álvara skumpað undir útlendska áhugan fyri føroyskum leikarum.

Eitt er tó áhugin. Nakað annað er, hvørji ítøkilig úrslit spyrjast burtur úr hesum, og nú er líkt til, at okkurt er í umbúna.

Í øllum førum kann nú staðfestast, at Jákup á Borg, sum var ein av teimum, sum mundi standa sterkastur í myndini í Hannover, í næstum fer av landinum til royndarvenjingar.

### Fáar viðmerkingar

Tað er Crewe Alexandra í triðbestu ensku deildini, sum hevur sýnt Jákupi áhuga, og sjálvur váttar Jákup, at hann sunnudagin fer til Onglands, har hann í eina viku skal royna seg hjá felagnum. Bæði í venjing og í dysti.

Onkrir snøklar hava verið í hesum, og millum annað var spurningur um at fáa frí frá arbeiði, men arbeiðsgevarin hevur tó sýnt vælvild, so »ís-sølumaðurin« á føroyska landsliðnum fekk umstøður at fara avstað.

Tað er tó ikki stórvegis, sum fæst at vita um ferðina. Sum sagt váttar Jákup á Borg sjálvur, at hann verður burturi í eina viku, og tað sama ger umboðsmaður hansara, Jákup í Stórustovu. Hann váttar, at Jákup á Borg verður í Crewe komandi vikuna, men annars hevur hann í løtuni ongar viðmerkingar til málið.




*Jákup á Borg úr B36 skal komandi vikuna royna seg hjá Crewe Alexandra í triðbestu ensku deildini*

### Lítið og tó

Tó at talan kanska ikki er um eitt av navnframastu feløgunum í Onglandi, so er einki at ivast í, at Crewe kann vera eitt áhugavert stað hjá einum ungum føroyskum leikara at koma til.

Felagið hevur í nógv ár borið orð fyri at vera ein av stóru klekingardeplunum í enskum fótbólti, og millum annað kann nevnast, at eitt nú Danny Murphy úr Liverpool og Neil Lennon úr Celtic traðkaðu sínar barnaskógvar í felagnum, áðrenn teir vórðu seldir víðari.

Venjari í felagnum er Dario Gradi, og hann er ikki hvør sum helst í enskum fótbólti. Yvir høvur man hann teljast millum teir venjarar í enskum fótbóli, sum hava sitið longst í venjarasætinum, og at hann ofta verður nýttur sum serfrøðingur á ymsum miðlum, tá landsdystir og annað eru á skránni, sigur eisini nakað um, at talan er um ein avhildnan venjara.

Sum sagt, so fer Jákup á Borg til Crewe nú sunnudagin, og fram til fríggjadagin skal hann so royna seg í felagnum.

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 3 | 3 - 0 - 0 | 73 | 59 | 14 | 6 |
| 2 Neistin | 4 | 2 - 1 - 1 | 84 | 75 | 9 | 5 |
| 3 VÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 73 | 61 | 12 | 4 |
| 4 Kyndil | 4 | 2 - 0 - 2 | 107 | 96 | 11 | 4 |
| 5 Stjørnan | 4 | 1 - 1 - 2 | 80 | 85 | -5 | 3 |
| 6 StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 74 | 86 | -12 | 2 |
| 7 Tjaldur | 5 | 1 - 0 - 4 | 102 | 131 | -29 | 2 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 4 | 3 - 0 - 1 | 120 | 104 | 16 | 6 |
| 2 Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 107 | 99 | 8 | 6 |
| 3 Kyndil | 3 | 2 - 0 - 1 | 90 | 78 | 12 | 4 |
| 4 VÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 83 | 78 | 5 | 4 |
| 5 H71 | 3 | 2 - 0 - 1 | 71 | 70 | 1 | 4 |
| 6 KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 60 | 76 | -16 | 0 |
| 7 Tjaldur | 4 | 0 - 0 - 4 | 103 | 129 | -26 | 0 |

**Snikkari**

Vit søkjast eftir snikkara at byrja skjótast gjørligt.

Vit bjóða:
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- góða løn

Vit vænta av tær:
- at tú ert ágrýtin
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álitandi

Løn:
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

Vatnsoyra Snikkaravirki p/f

**Arbeiðsmaður**

Søkt verður eftir røskum arbeiðsmanni, at hjálpa til í bakaríinum skiftandi vaktir.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen

HJÁ GUNLEIVI

Tlf. 228888 ella 312161

**Timburmaður**

Søkt verður eftir timburmanni til forskallings- og timburarbeiði í Eysturoy og Streymoy.

ARTICON Tlf. 350700




**Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu**

Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.s.

ALTI 2100 til rúm støddir uml. 50-80 m² kr. 1.895,-

ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 m² kr. 2.095,-

ALTI 2214 til rúm støddir uml. 200 m² kr. 2.995,-

SPF. ALTING tlf. 210 298 fax 318 591

Vit senda um alt landið

**Søkt verður eftir lærlingi til eykalutagoymsluna**

FHS-prógv er ein fyrimunur. Hevur hetta tín áhuga, send eina skrivliga umsókn til:

Bilasølan
v/ Øssur Johannesen
postboks 3192
110 Tórshavn
Tlf. 315354

**Dagrøktari á Válinum**

Søkt verður eftir dagrøktara at byrja frá 1. januar 2003.

Dagrøktarheimið skal m.a. verða innrætta soleiðis, at børnini hava rúm at spæla í, og at trygt er at spæla uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jónu E. Jacobsen á tlf. 421660.

Kvívíkar kommuna
FO-340 Kvívík • Tlf. 421294

**Skrivstovufólk**

Vegna barnsburðarfarloyvi søknast vit eftir avloysara, í umleið eitt ár, á høvuðsskrivstovuni í Klaksvík.

Arbeiði er ordramóttøka, fakturering o.a.

Vit rokna við at tú hevur nakað av royndum í skrivstovuarbeiði.

Løn eftir avtalu.

Send okkum umsókn saman við avritum av prógvum og royndum til:

Føroya Bjór
Postbox 4
Klakksvíksvegur 19
FO-700 Klakksvík

**HYUNDAI ACCENT ÁRG. 06/01**

Hyunda Accent 1,5
Árg. 06/01
Km. 17.000 Lit bláur met.
Alu felgur
Pikadekk við felgum
Fløguspælara
El rútar
Klima anlægg v.m.
Bilurin er enn sum nýggjur.
Nýprísur 150.000

Nú 130.000

Bilfríðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

**OPEL OMEGA 2,5 TD Árg. 11/94**

OPEL OMEGA 2,5 T/D
Turbo Diesel
Árg. 11/94 Km 140.000
Alu felgur
El rútar
Fjarst. sentrallás
Klima anlæg
El setur

Útgjald 33.000,- / 165.000,-
Rest práta vit um.

Bilfríðkan við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

**Teoriskeið á Glyvrum**

Nýtt skeið byrjar mánakvøldið 28.oktober kl. 19-21

Eysturoyar Teoriskúli
Ole Lykke, tel. 220 972
Hugo Kristiansen, tel. 225 225

**Maskinførari**

Søkt verður eftir royndum maskinførara til gravmaskinu á beltum.

ARTICON Tlf. 350700